Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Útgjaldslágmark í formi av sosialari skipan til barsilstíðina

Spurningar:

1. Hvat heldur landsstýriskvinnan um eina sosiala skipan, sum liggur uttanfyri galdandi barsilsskipan, sum tryggjar øllum foreldrum eina lágmarksupphædd í barsilstíðini úr landskassanum?
2. Hvat hevði tað kostað landskassanum árliga at tryggja eina lágmarksupphædd á ávikavist 5.000, 10.000 ella 15.000 krónur um mánaðin, sum varir líka leingi, sum barsilstíðin er í dag?
3. Sær landsstýriskvinnan aðrar møguleikar, enn uppskotið omanfyri, fyri at útrudda fíggjarligar orsakir til fosturtøku og at fáa burðartalið upp?

Viðmerkingar:
Ein av høvuðsorsøkunum til fosturtøku er fíggjarligu umstøðurnar hjá mammuni og pápanum. Tað kundi tí verið skilagott at tryggjað øllum foreldrum eina lágmarksupphædd í barsilsskipanini ella aðrari skipan. Hetta fyri at minka um, at tað fíggjarliga frameftir er orsøk til at velja fosturtøku.

Áður hevur verið kjakast um, at skipanin er órættvís á tann hátt, at tú bert fært nakað burtur úr barsilsskipanini, um tú leggur arbeiðslív og barnsburð til rættis á ávísan hátt. Summir borgarar kunnu eiga fleiri børn, men ongantíð fáa nakað úr barsilsskipanini, men hinvegin bert gjalda inn.

Afturat hesum stendur so at siga allur vesturheimurin í tí støðu, at ov fá børn verða fødd. Eitt nú hevur stjórnin í Ungarn ætlanir um at strika inntøkuskattin hjá øllum kvinnum, sum hava føtt í minsta lagi fýra børn. Ein lágmarksupphædd í barsilsskipanini ella aðrari sosialari skipan kundi verið eitt líknandi átak at bøtt um hendan trupulleikan, sum eisini ger seg galdandi í Føroyum.

Til munnligar fyrispurningar mikudagin 6. september 2023, vísti landsstýriskvinnan í umhvørvismálum til landsstýriskvinnuna í almannamálum í samband við fyrispurning um at tryggja eitt lágmarksútgjald til foreldur í barsilstíðini uttan fyri barsilsskipanina. Við øðrum orðum at gera eina sosiala skipan sum tryggjar slíkt lágmarksútgjald.

Á Løgtingi, 7. september 2023

Steffan Klein Poulsen